

1991–2019

# KARIES-SKRÁSETING

Børn frá 5–15 ár

Tannlækna-felagið

Heilsumálaráðið 2020

# INNIHALDS-YVIRLIT


| | | |
|---|---|---|
| Inngangur | | síða 4 |
| Prosentpartur av børnum og ungum við fRískum tonnum | | síða 5 |
| Mynd I | Barnatenn í FO 1991–2019 | síða 6 |
| Mynd II | Torleikastøðið í FO 1991–2019, barnatenn | síða 7 |
| Mynd III | Vaksnamannatenn 1991–2019 | síða 8 |
| Mynd IV | Torleikastøðið í FO 1991–2019, vaksnamannatenn | síða 9 |
| Mynd V | Svarprosent av SEF skrátsetingum | síða 10 |
| Mynd VI | DMF-S kohorta 1991–2019 | síða 11 |
| Mynd VII | Barnatenn, kariesstøðan kring landið 1991–2019 | síða 12 |
| Mynd VIII | Vaksnamannatenn, kariesstøðan kring landið 1991–2019 | síða 13 |
| Samandráttur og tilmæli | | síða 14 |
| Orðafrágreiðing | | síða 15 |

# INNGANGUR

Í 1991 vórðu tannlæknarnir í Føroyum samdir um at fara undir at skráseta øll skúlabørn fyri tannsjúkur eftir altjóðareglunum hjá WHO. Hetta fyri at fáa nágreinilig tøl til at lýsa tannheilsustøðuna hjá føroyskum børnum. Við hesum hagtølum varð tað skilagóða í regluligari, skipaðari barna- og ungdómstannrøkt eyðsýnt fyri kommunu- og landspolitikarar, og tóku teir undir við hesum.

## Søguliga gongdin viðvíkjandi skráseting av tannheilsu í Føroyum

Í 1991, tá føroysku tannlæknarnir fóru undir skipaða skráseting av tannheilsuni hjá børnum og ungum í fólkaskúlanum, var lógin um barnatannrøkt[1] bert galdandi fyri 7–14 ára gomul børn.

Í 1998 víðkaðist lógin um ókeypis tannrøkt til at galda fyri øll børn og ung í 0–15 ára aldri.[2]

Í 2014 víðkaðist lógin um ókeypis tannrøkt til eisini at fevna um tey 16–18 ára gomlu.[3]
Sostatt fáa øll føroysk børn og ung í aldrinum upp til 18 ár nú tilboð um ókeypis tannrøkt.

Grundarlagið undir skipaðu skrásetingini er *Sundhedsstyrelsens Cirkulære af 22. nov 1999 om indberetning på børne- og ungdomstandplejeområdet*. Í kapittuli 2, §4, stk. 2, stendur: *„Indberetningspligten omfatter børn i alderen 5, 7, 12 og 15 år.“*

Føroysku tannlæknarnir fylgja hesi lógargreinini.

*Í Løgtingslóg um barna- og ungdómstannrøkt §7, stk 2,* stendur:
„Landstýrismaðurin í heilsumálum skipar fyri, at hagtøl yvir tannlæknanna virksemið verða gjørd. Landskassin ber útreiðslurnar fyri gerð av hagtølum“.
Føroyskir tannlæknar fylgja hesi lógargreinini, og Tannlæknafelagið hevur sett eina SEF-nevnd at taka sær av innsavnan og viðgerð av hagtølum fyri børn og ung í Føroyum.

## *„Frískar tenn alt lívið“*

… er endamálið við at brúka tíð, orku og fíggjarmegi upp á tannrøkt.
Skrásetingin av teim 15 ára gomlu í 2019 vísir, at 49% av teimum hava púra frískar tenn. Gloymast skal tó ikki, at 51% hava havt brendar tenn og tí fingið viðgjørt tenninar, og skulu hesar síðani haldast við líka restina av lívinum. Hetta er ikki nøktandi, og arbeiðast má fram ímóti, at enn fleiri børn og ung varðveita heilar og frískar tenn alt lívið.

[1] Kongelig anordning nr. 454 af 7. juli 1986 om ikrafttræden på Færøerne af lov om børnetandpleje.
[2] Løgtingslóg nr. 23, 6. mars 1998
[3] Løgtingslóg nr. 39, 6. mai 2014

# Prosentpartur av børnum og ungum við fnískum tonnum

| Fnískar barnatenn | | | Fnískar vaksnamannatenn | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Barnatenn | 2004 | 2019 | Vaksnamannatenn | 1991 | 2019 |
| 5 ára gomul | 53% | 80% | 7 ára gomul | 62% | 95% |
| 7 ára gomul | 24% | 58% | 12 ára gomul | 12% | 67% |
| – | – | – | 15 ára gomul | 4% | 49% |

Talið av børnum við fnískum tonnum, t.e. tonnum við ongum karies/holum í, er vaksandi.
Á taltalvuni omanfyri sæst, at tannheilsan er alsamt batnað.

# Samanborið við Danmark

| Aldur | Danmark 2019 | Føroyar 2019 |
|---|---|---|
| **12 ára gomul** *Fnískar tenn* | 82% | 67% |
| **15 ára gomul** *Fnískar tenn* | 67% | 49% |

Sum tað sæst á talvuni, høvdu 82% av teim 12 ára gomlu børnunum í Danmark heilar og fnískar tenn í 2019. Til samanberingar vóru í sama aldursbólki 67% av føroyskum børnum, ið eingi hol høvdu í tonnunum í 2019. Um hugt verður at teim 15 ára gomlu, so hava 49% av føroysku børnunum heilt fnískar tenn, har talið í Danmark í 2019 er 67%.

Endamálssetningurin hjá føroyskum tannlæknum: „Fnískar tenn alt lívið" er enn ikki rokkin fyri øll. Tí er tað neyðugt framhaldandi at arbeiða miðvíst við upplýsing og fyribyrgjandi tannrøkt, fyri at tannheilsan hjá børnum og ungum í Føroyum skal gerast enn betri.
Fyrimunirnir við góðari tannheilsu eru eyðsæddir, og fyri einstaka borgaran eins væl og fyri samfelagið sum heild er fyribyrgjandi tannrøkt minni orkukrevjandi og bíligari enn tannviðgerð. Vansarnir av vánaligari tannheilsu eru hinvegin nógvir í gerandisdegnum, so sum pína, manglandi svøvnur, trupulleikar við at tyggja/eta og trupulleikar við at møta upp í barnagarði/í skúla/til arbeiðis. Harumframt kunnu vánaligar tenn hava ávísa stigmatisering við sær.

Tann orkan, sum nú verður løgd í at fremja tannheilsuna hjá unga ættarliðnum, verður væl afturlønt seinni.

## Mynd I

Tannsjúkur í **barnatonnum** hjá 5 og 7 ára gomlum børnum, 1991–2019
Skrásettar sum sjúkir **tannflatar (surfaces)** í miðal og býttar upp í brendar, fyltar og trektar flatar.




**Mynd I:** Myndin vísir defs[4]-virðini fyri barnatenn hjá 5 og 7 ára gomlum børnum. defs-virðið[5] er miðaltalið á sjúkum flatum á barnatonnum, t.v.s brendir/fyltir/trektir flatar tilsamans. Í alt eru barnatenninar 20 í tali og hava tilsamans 88 flatar. Í 2019 var talið á sjúkum flatum á barnatonnunum hjá 5 ára gomlum í miðal 0,96 flatar og fyri tey 7 ára gomlu var miðaltalið 2,52 flatar.

**Niðurstøða:** Stabbarnir vísa, at talið á brendum flatum á barnatonnum er støðugt minkandi, og tað er talið á trektum barnatonnum somuleiðis. Tað vil samanumtikið siga, at alt færri barnatenn verða trektar, og harvið verða sjálvsagt fleiri barnatenn varðveittar, hóast tær eru ella hava verið brendar. At varðveita barnatenninar hevur m.a. stóran týdning fyri, at vaksnamannatenninar koma fram á rætta plássið.

[4] Lítlir stavir í styttingini dmf-s merkja, at talan er um barnatenn.
[5] Sí eisini orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd II

Torleikastøði,[6] **barnatenn** hjá 5 og 7 ára gomlum, 1991–2019:




**Mynd II:** Avmyndar „torleikastøðið," t.v.s., hvussu nógv prosent av børnunum eru ávikavist á:

- Støði 1 = hava frískar tenn við ongum karies. Víst við óbrotnum (fullteknaðum) strikum.
- Støði 3 + 4 = hava tenn við álvarsomum karies. Víst við brotstrikum.

**Okkara mál** er, at óbrotnu strikurnar skulu liggja so ovarlaga sum gjørligt, og brotstrikurnar so niðarlaga sum gjørligt. Vit vilja v.ø.o. stremba eftir, at torleikastøðið alsamt batnar.
Á *Mynd II* sæst, at soleiðis hevur gongdin eisini verið í tíðarskeiðnum frá 1991–2019.
Kariesstøðið í barnatonnum er sum heild vorðið minni álvarsamt í hvørjum, og tað merkir samstundis, at talið av børnum við frískum barnatonnum økist:

Prosentparturin av børnum við frískum barnatonnum á støði 1 økist støðugt:

- Fyri 5 ára gomul vaks prosentparturin frá umleið 29 prosentum í 1991 til gott 79 prosent í 2019.
- Fyri 7 ára gomul vaks prosentparturin frá umleið 9 prosentum í 1991 til uml. 58 prosent í 2019.

Prosentparturin av børnum við brendum barnatonnum á støði 3 og 4 er harafturímóti støðugt minkandi:

- Fyri 5 ára gomul minkaði prosentparturin frá uml. 53 prosentum í 1991 til uml. 13 prosent í 2019.
- Fyri 7 ára gomul minkaði prosentparturin frá uml. 82 prosentum í 1991 til uml. 36 prosent í 2019.

[6] Sí orðafrágreiðing á síðu 15

## Mynd III

Tannsjúkur í **vaksnamannatonnum** hjá 7, 12 og 15 ára gomlum børnum, 1991–2019
Skrásettar sum sjúkir **tannflatar** í miðal og býttar upp í brendar, fyltar og trektar flatar.




**Mynd III:** Myndin vísir DMFS[7]-virðini fyri vaksnamannatenn hjá ávikavíst 7, 12 og 15 ára gomlum í Føroyum. DMFS-virðið[8] er miðaltalið á sjúkum flatum á vaksnamannatonnum tilsamans, t.v.s. á brendum/fyltum/ trektum flatum. Í alt eru 28 vaksnamannatenn, og hesar hava tilsamans 128 tannflatar. Í 2019 var talið á brendum tannflatum hjá 7 ára gomlum 0,11, hjá 12 ára gomlum 1,01 og hjá 15 ára gomlum 2,31 tannflatar í miðal.

**Niðurstøða:** Stabbarnir vísa, at talið á brendum vaksnamannatonnum er støðugt minkandi, og tað er talið av trektum vaksnamannatonnum somuleiðis. Frá 1991 til 2019 er støðan batnað í øllum teimum skrásettu aldursbólkunum. Serliga hjá teimum 15 ára gomlu síggjast stór framstig, og gevur hetta góðar vónir um, at alt fleiri kunnu varðveita sínar egnu tenn í góðum standi alt lívið.

[7] Stórir stavir í styttingini DMF-S merkir vaksnamannatenn.
[8] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd IV

Torleikastøðið[9], **vaksnamannatenn** hjá 7, 12 og 15 ára gomlum, 1991–2019:




**Mynd IV:** avmyndar „torleikastøðið," t.v.s., hvussu nógv prosent av børnumum eru ávikavist á:

Støði 1 = hava frískar tenn. Víst við óbrotnum (fullteknaðum) strikum.
Støði 3+4 = hava tenn við álvarsomum karies. Víst við brotstrikum.

**Niðurstøða:** Ynskiligt er, at óbrotnu strikurnar skulu vera so ovarlaga sum gjørligt, og brotstrikurnar so niðarlaga sum gjørligt. Sum tað sæst á strikumyndini omanfyri, hevur hetta eisini verið gongdin higartil.

Sum heild hækkar prosentparturin av børnum við púra frískum tonnum (støði 1) alsamt:

- Fyri 7 ára gomul fór prosentparturin frá uml. 62 prosentum í 1991 til uml. 95 prosent í 2019
- Fyri 12 ára gomul vaks prosentparturin frá uml. 12 prosentum í 1991 til gott 67 prosent í 2019
- Fyri 15 ára gomul fór prosentparturin frá uml. 4 prosentum í 1991 til góð 49 prosent í 2019

Prosentparturin av børnum við álvarsomum karies í vaksnamannatonnunum (støði 3 + 4) er hinvegin lækkaður:

- Fyri 7 ára gomul lækkaði prosentparturin frá 8,5 prosentum í 1991 til 1,2 prosent í 2019
- Fyri 12 ára gomul lækkaði prosentparturin frá 62 prosentum í 1991 til 17 prosent í 2019
- Fyri 15 ára gomul lækkaði prosentparturin frá 75 prosentum í 1991 til 34 prosent í 2019

[9] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

## Mynd V

# Svarprosent: skráseting av 12 ára gomlum børnum í Føroyum í 2018

| Postnr. | Tannrøkt | SEF skrásett | Hagstovan | Svarprosent | |
|---|---|---|---|---|---|
| 100 | Tórshavn | 293 | 314 | 93 | |
| 210 | Sandur | 17 | 27 | 62 | |
| 350 | Vestmanna | 0 | 22 | 0 | |
| 360 | Vága kom | 15 | 33 | 45 | |
| 380 | Sørvági | 15 | 23 | 65 | *GG: reg 11 ára gomul* |
| 430 | Hvalvík | 31 | 35 | 89 | |
| 480 | Skála | 0 | 29 | 0 | |
| 520 | Eystur kom | 31 | 42 | 74 | |
| 530 | Fuglafjørður | 19 | 23 | 83 | *GG: reg 11 ára gomul* |
| 620 | Runavík | 34 | 44 | 77 | |
| 650 | Nes | 16 | 36 | 44 | |
| 700 | Klaksvík | 68 | 88 | 77 | |
| 800 | Tvøroyri | 38 | 31 | 122 | |
| 900 | Vági | 32 | 23 | 139 | |
| **Í alt** | | **590** | **747** | **75** | |

Sum nevnt í formælinum, hava føroyskir tannlæknar skyldu til at skráseta ávísar árgangir. Grundarlagið undir skipaðu skrásetingini er *Sundhedsstyrelsens Cirkulære af 22. nov 1999 om indberetning på børne- og ungdomstandplejeområdet.* Í kapittul 2, §4, stk. 2, stendur: *„Indberetningspligten omfatter børn i alderen 5, 7, 12 og 15 år."*

Sum talvan omanfyri vísir, er ymiskt hvussu nógvar skrásetingar verða gjørdar í ymisku kommununum. Í 2018 eru 75% av teimum 12 ára gomlu børnunum við í skrásetingunum.

Neyðugt er at nevna nakrar feilkeldur, sum kunnu koma fyri. T.d. at fleiri børn verða skrásett í mun til barnatalið kann skyldast, at børn ganga í tannrøktini, sum ikki eru skrásett at búgva í kommununi. Hetta kunnu vera børn, sum í styttri ella longri tíðarskeið ganga í skúla í kommununi og eisini koma til tannlækna har, uttan at vera flutt á fólkayvirlitinum. Onnur feilkelda kann vera, at t.d. føðiár ikki er rætt upplýst ella tastað inn.

Nakrar kommunur hava ikki sent tølini inn og vilja vit heita á øll, at senda skrásetingarnar inn, soleiðis at hagtølini geva eina so rætta og álítandi mynd sum gjørligt.

## Mynd VI

# Karies kohorta




Omanfyri sæst DMF-S talið hjá børnum frá tey eru 7 til tey eru 15 ára gomul. Myndin vísir seks árgangir, børn fødd 1984–1987–1995–1999–2004.

Á myndini sæst at DMF-S talið er lækkað gjøgnum tíðina, fyri tey 7 ára gomlu frá 1,14 til 0,08, fyri tey 12 ára gomlu frá 3,56 til 1,2 og tá hesir somu árgangirnir eru 15 ár, fellur DMF-S talið frá 7,56 til 2,31.

Myndin vísir væl hvussu kariesstøðan er batnað frá 1991 til 2019. Hon avmyndar eisini, at karieskurvan flatar út sum árini ganga.

# KARIESSTØÐAN KRING LANDIÐ

*Mynd VII* og *VIII* vísa def-s og DMF-S virðini í kommununum kring landið.
Fleiri kommunusamanleggingar eru framdar. Hetta hevur við sær, at skráseting av tannheilsuni í ávísum kommunum nú eru savnaðar undir einum postnummari. Dømi um hetta er Eysturkommuna, har postnummurini 510 og 520 vorðu savnað undir 510 í 2017.

## Mynd VII

**Barnatenn.** Kariesstøðan kring landið og í einstøku kommununum 7 ára gomul, def-s-virði[10] frá 1991–2019.




**Mynd VII:** vísir kariesstøðuna fyri barnatenn hjá 7 ára gomlum børnum í ymisku kommununum í árunum 1991, 1996, 2001, 2006, 2011, 2016 og 2019.
Landsmiðaltølini eru ytst vinstrumegin, síðan koma miðaltølini fyri hvørja einstaka kommunu. Kommunurnar eru settar upp eftir postnummari við hækkandi tali frá vinstru til høgru.

[10] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

**Niðurstøða:** Hóast miðaltalið av barnatonnum við karies er eitt sindur skiftandi frá einari kommunu til aðra og frá ári til ár, hevur gongdin fyri alt landið í tíðarskeiðnum frá 1991–2019 verið tann, at føroysk børn hava alsamt færri hol í barnatonnunum, og alt færri barnatenn verða trektar.

## Mynd VIII

**Vaksnamannatenn.** Kariesstøðan kring landið og í einstøku kommununum 12 ára gomul. DMF-S-virði[11] frá 1991–2019.




**Mynd VIII:** vísir kariesstøðuna fyri vaksnamannatenn hjá 12 ára gomlum børnum kring landið í árunum 1991, 1996, 2001, 2006, 2011, 2016 og 2019.

Miðaltølini fyri alt landið eru ytst vinstrumegin, og síðan eru tølini fyri kommunurnar settar upp eftir postnummari sum í talvu VII.

**Niðurstøða:** Tølini fyri vaksnamannatenninar í talvu VIII vísa líknandi framstig sum tølini fyri barnatenninar í talvu VII. Úrslitini fyri kommunurnar eru skiftandi og lækka ikki í beinum raði allastaðni. Tó er kariesstøðan munandi batnað í øllum økjum frá 1991 til 2019, og samanumtikið er talið av brendum tonnum minkað ár undan ári í skrásetingartíðarskeiðnum fyri alt landið. Nøgdin av trektum vaksnamannatonnum er í sama tíðarskeiði minkað niður í mestsum einki.

[11] Sí orðafrágreiðing á síðu 15.

# SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI

Sambært Løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 við uppískoytinum, Løgtingslóg nr. 39, 6. mai 2014, so eru øll børn og ung frá 0 til og við 17 ára aldur í Føroyum fevnd av tilboðnum um ókeypis tannrøkt.

Við støði í SEF-skrásetingini kann staðfestast, at hóast tannheilsan hjá føroyskum børnum er batnað nógv, kann hon gerast uppaftur betri.
Ynskiligt er at minka munandi um kariestilgongdina. Serligur dentur má leggjast á at minka um talið á børnum við álvarsamari kariessjúku (torleikastøði 3–4) og at vaksa um talið á børnum, sum hava heilt f153rískar tenn (torleikastøði 1). Endamálið er, at so nógv sum yvirhøvur gjørligt varðveita fh153rískar og sterkar tenn alt lívið, og sjálv verða før fyri at røkja sínar tenn.

Sum er, er ikki lógarkrav at skráseta tey 16 og 17 ára gomlu. Tískil eru eingi hagtøl fyri hesar árgangir, og er ikki gjørligt at hava tey við í hesi kariesskrásetingini. SEF-nevndin heitir á tannlæknarnar eisini at skráseta tey 17 ára gomlu.

Ynskiligt er at fáa hagtøl fyri kariesstøðuna hjá vaksnum. Her verður hugsað um talið á frískum, brendum, fyltum og trektum tonnum, umframt handilstonnum og implantatum. Sjúkur í tannhaldinum eru ofta atvoldin til, at eldri fólk missa tenninar, og tí er tað týdningarmikið eisini at skráseta tannhaldssjúkur.
Eingi almenn hagtøl viðvíkjandi tannheilsuni hjá teim vaksnu eru til taks í Føroyum.
SEF-nevndin heldur tað vera umráðandi at fáa hagtøl fyri henda bólk til vega. Vit hava ár eftir ár umrøtt týdningin av hesum, men tíverri er einki hent enn. Heitt verður tí á Tannlæknafelagið og privatu tannlæknarnar í samráð við Heilsutrygd at arbeiða víðari við hesum málinum.
Ein leistur, ið kann nýtast, er at skráseta ávísar árgangir. Í Danmark er avtala gjørd millum tannlæknar og Sygesikringen um, at ávísir árgangir, tey 25, 40 og 65 ára gomlu, skulu skrásetast. Harumframt mæla vit til eisini at skráseta tey 75 og 85 ára gomlu í Føroyum havandi í huga, at miðallivialdurin í okkara parti av heiminum er hækkandi.

SEF-frágreiðingin, ið er umbiðin av Heilsumálaráðnum, verður givin út annaðhvørt ár.

*Oktober 2020, SEF-nevndin hjá Tannlæknafelagnum*

Sigrid Arge, *tannlæknastjóri Tórshavnar Kommuna og*
Unn Jakobsen, *tannlæknaleiðari, Klaksvíkar Kommuna*

# ORÐA-FRÁGREIÐING

**SEF** (**S**jónlig **E**yðkennis **F**yribrygdi): Skráseting av tonnum (ella tannflatum): av brendum tonnum, fyllingum, trektum tonnum, vantandi tonnum, bitfeilum, tannhaldssjúkum o.a.t.

**DMF-S/def-s:** Talið av sjúkum flatum tilsamans
**S/s:** „surfaces“ = flatar
**DMF-T/def-t:** Talið av sjúkum tonnum tilsamans
**T/t:** „tooth“ = tonn
**Stórir stavir** = vaksnamanntenn/ **Lítlir stavir** = barnatenn
**D/d:** „decayed“ = brendir tannflatar ella brendar tenn
**M/e:** „missing“/„extracted“ = trektir tannflatar ella trektar tenn
**F/f:** „filled“ = fyltir tannflatar ella fyltar tenn

**Torleikastøði:** (á donskum sværhedszoner) = % talið av børnum, sum hava:

| | |
|---|---|
| **STØÐI 4**<br>***Hol í framtonnum og á sløttum flatum*** | Allir flatar móti andliti og munnholu<br>*(uttan lagdir í jakslum og framtonnum)*<br>Síðuflatar longst móti miðjuni á kinntonnum. Allir síðuflatar á framtonnum |
| **STØÐI 3**<br>***Hol á síðuflatum*** | Allir síðuflatar á jakslum og framjakslum. Síðuflatar longst frá miðjuni á kinntonnum |
| **STØÐI 2**<br>***Hol í natúrligum foyrum og lagdum*** | Allir tyggiflatar.<br>Allar lagdir á fram- ella baksíðu á jakslum og framtonnum |
| **STØÐI 1**<br>***Einki hol*** | Heilar og frískar tenn |

**Barnatenninar** eru 20 í tali og hava tilsamans 88 tannflatar.
**Vaksnamannatenninar** eru 28 í tali og hava tilsamans 128 tannflatar.
*(vísdómsjakslarnir verða ikki taldir við).*

**SCOR:** **S**undhedsstyrelsens **C**entrale **O**dontologiske **R**egister.
**OCR:** **O**ptical **C**haracter **R**ecognition.
**WHO:** **W**orld **H**ealth **O**rganisation: Heimsheilsustovnurin undir ST.

***Keldur:***
*Føroysk SEF-tøl 1991–2019*
*Hagstova Føroya 2018 og 2019*
*Sundhedsstyrelsen: DK SCOR alle kommuner og regioner 2018 og 2019*
*Sundhedsstyrelsens Indberetning på børne og ungdomstandplejeområdet, 1999*

***Lógarverk:***
*Løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt*
*Løgtingslóg nr. 39 frá 6. mai 2014 um broyting í lóg um barna- og ungdómstannrøkt*
*Postverk Føroya: Postøki/postnummur*

Heilsumálaráðið 2020

SENDISTOVAN